*Ríkistuðulin úr Danmark hevur havt avgerandi týdning fyri at vælferðarstøðið í Føroyum hevur verið á hædd við onnur. Skulu Føroyar hava ein sjálvberandi búskap, kann tað bara gerast við einari størri, sterkari, sunnari og kappingarførari útflutningsvinnu. Men tað eru nógv greið tekin um, at føroysk vinna ikki megnar at kompensera eina minking í ríkisstuðulinum og ongi útlit eru fyri at hetta hendir komandi 20–30 árini, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Føroya Handilsskúla*



sjálvberandi búskap, er serliga fylgjandi:

- Broyta javnvágna millum almenna og privata sektorin
- Menna førleikan á arbeiðsmarknaðinum og herundir umstillingarevnini
- Umleggja samhandilin við útlandi
- Skapa nýggj arbeiðspláss og vinnur.

Henda uppgávan kann ikki loysast uppá stutt sikt, men er treytað av bygnaðarbroytingum í samfelagnum og vinnuni og broytingum í vanahugsan. Í Føroyum er lítið, sum bendir á, at politiska skipanin arbeiðir við at menna omanfyri nevndu fortreytir og annars arbeiðir langtsiktað við hesum – royndirnar prógva, at onki er hent á nøkrum av hesum økjum..

Fokusøkir til at náa málinum, um ein sjálvberandi búskap:

- Geva almennan stuðul til menning av vinnuligum karmunum
- Útbúgving og vitan
- Privatisering av almennum virksemi (tilfeingisflytingar)
- Kommunusamanlegging – bíligari og betri tænastur.

Hetta hevur við sær, at setast skal av førleiki og fígging til fylgjandi økir:

- Útbúgving – væl kvalifiserað arbeiðsmegi til allar vinnugreinar
- Arbeiðsmarknaður – arbeiðsmarknaður, sum stuðlar uppundir eina dynamiska vinnu
- Kappingarviðurskifti – privat vinna sum grundarlag undir sjálvberandi búskapi
- Infraskipanir og bústaðir – stuðul uppundir mobilitetin í arbeiðsmegini og vinnuni, og til kappingarførar prísir. Tað er serliga kritiskt at fáa loftvegis sambandið til útheimin effektivt og bíligt.
- Íverksetarí – menna eina dynamiska vinnu (krevur royndir og útbúgving)
- Innovatión – drívmegi aftanfyri menningina av vinnuni.

Tað er viðkomandi at staðfesta, at landsstýrið hevur fyri nógvum árum síðani fyrireikað og sett út í kortið at fremja privatiseringar av almennum vinnufyritøkum, sum ein liður í lættari at tilføra kaptal til at menna hesar fyritøkur og annars sleppa landinum undan av reka vinnuligt virksemi, sum annars kann gerast av privatum á einum fríum marknaði við kapping. Hetta er partvíst gjørt, men politiskt verður knappliga farið undir tjóðartøku av vinnufyritøkum, Politiska signalið er greitt – tað verður ikki hugsað um, at ein sterk føroysk vinna skal verða við til at skapa ein sjálvberandi búskap og tryggja vælferðina.

## Sjálvgleðin er skaðilig

So slogani um, at føroyski búskapurin eru væl fyri, er beinleiðis skeivt og virkar heldur sum sovikoddi og er við til at taka drivið burtur frá aktørunum í samfelagnum. Politiska sjálvgleðin er skaðilig fyri alla menning, tí alt kann gerast nógv betur. Politikarar og aðrir aktørar eiga at vera sjálvkritiskir um búskaparstøðuna við teimum fakts, sum fyriliggja, soleiðis at vit kunnu hava álit á, at skipanin ikki er hildin uppat at virka.

Tað er nógv meira trúverdugt og álitisvekjandi, at politikarar vísa á teir strategisku trupulleikar, sum veruliga eru í samfelagsbúskapinum og síðan siga, hvørji politisk mál eru neyðug at seta, hvar fokus skal setast og hvørjar loysnir hóska best og hvørji vinnupolitisk prinsippir eiga at haldast. Alt hetta má síðan síggjast aftur í leiðslu- og stýringaramboðum sum fíggjarlóg, serlógir, vinnupolitikkur, bygnaðarbroytingar o.a.

## Boðskapir

1. Vøru- og tænastujavnin vísir, at primeri raksturin mótvegis útlandinum er, og hevur verið tey seinastu árini, út av lagi vánaligur - gongdin í 2007 og 2008 sær út til at halda áfram og versna. Her eiga fíggjarpolitisk tiltøk at verða sett í verk fyri at venda gongdini – eitt nú við at seta fokus á at produktmenna og betra kappingarføri hjá útflutningsvinnuni og menna nýggjar vinnur og fyritøkur.

2. Vøru- og tænastujavnin vísir, at føroyska vinnan megnar ikki at kompensera fyri einari minking í ríkisstuðlinum - gongdin vísir tað øvugta við lítlum vøkstri í útflutninginum av vørum og tænastum í fleiri ár. Hetta bendir á ein búskap, sum ikki megnar innovatión og tillagingar – skilt á tann hátt, at produktiviteturin og effektiviteturin í realframleiðsluni sum heild stendur i stað ella minkar í útflutningsvinnuni.

3. Gjaldsjavnin vísir, at føroyski búskapurin hongur í síðsta enda saman av inntøku- og rakstrarflytingum. Men týðandi partar av inntøkuflytingunum fara at broytast munandi komandi árini vegna fíggjarkreppuna. Og tí kann væntast við rímuliga stórum halli á gjaldsjavnanum longu í 2008, serliga vegna vantandi avkast frá virðisbrøvum.

4. Føroyski búskapurin hevur eitt versnandi kappingarføri, er bygnaðarliga ósunnur og er annars serliga viðbrekin yvirfyri broyttum náttúrugivnum fortreytum – jo-jo-búskapur. Versnandi kappinagrføri sæst best við at hyggja eftir, hvussu útflutningurin haltar meira og meira afturút í mun til innflutningin. Føroyski búskapurin er bygnaðarliga ósunnur vegna almennan stuðul til vinnuna, avskeplaður kommunubygnaður og tað at ongar nýggjar virðisskapandi vinnur verða settar á stovn.

5. Tað er nógv, sum bendir á, at Føroyar verða raktar meira og minni av fíggjarkreppuni, men eisini av einari búskaparkreppu. Greiðu tekinini um eitt turnaround í búskapinum komandi árini eru: 1. vánaligur fiskiskapur, 2. vantandi lønsemi og hall í høvuðsvinnuni, 3. høgir oljuprísir, 4. høgir matvøruprísir, 5. handlar geva ikki kredit, 6. peningastovnar eru sera varnir at veita lán 7. arbeiðsloysi í lokalu økjunum og 8. ongin netto fólkavøkstur.

6. Verður ríkisveitingin minkað fer hetta at fáa katastrofalar avleiðingar fyri raksturin hjá landinum mótvegis útlandinum og fyri landshúsarhaldið isolerað sæð. Fyri at rætta gjaldsjavnan uppaftur, hevði verið neyðugt við stórum skjeringum í rakstrinum á fíggjarlógini (avleiðingin er ein fallandi eftirspurningur eftir útlendskum vørum og tænastum), ella noyðist landskassin at fíggja hall við innistandandi ella lántøku (uppá eitt sindur longri sikt ber hetta seinna ikki til). Hetta vísir eisini metingin frá Modey´s – kreditvirðið hjá Føroyum er fult út treytað av ríkisveitingini og at danski staturin stendur sum garantur aftanfyri føroyska búskapin.

7. Í løtuni er tað meiningsleyst at tosa um ein sjálvberandi búskap komandi árini – tað, sum er neyðugt, er at rudda upp í ineffektivum skipanum, flyta tilfeingi frá almennum til privat virksemi, fremja stórar bygnaðarbroytingar og skapa vinnuligar karmar, sum ger tað møguligt yvirhøvur bara at tosa ein sjálvberandi búskap.

8. Seinastu árini hevur leikluturin hjá løgtinginum og landsstýrunum verið passivur og tilvildarligur í dreymatosinum um ein sjálvberandi búskap. Skjeringar í blokkstuðlinum ella fastfrystan av sama hava útilokandi verið stýrdar av há- ella lágkonjunkturum. Tað eru so at siga ikki skaptar nakrar nýggjar bygnaðarligar fortreytir fyri at menna ein sjálvberandi búskap – heldur hendir tað øvugta.

## Útlitini fyri einum sjálvberandi búskapi

Einasti hátturin at spáa um framtíðina, er at royna at skapa hana sjálvur. Útlitini verða ikki betur enn tey mál og tann orka, sum politiska skipanin brúkar til at náa einum sjálvberandi búskapi. Í løtuni gevur tað ikki meining at meta um nøkur útlit, annað enn, at fortreytirnar í búskapinum eru tær, sum vit altíð hava kent tær og tí kunnu ikki væntast nakrar broytingar mótvegis einum vinnuliga haldgóðum sjálvberandi búskapi. Tvørturímóti kann staðfestast, at er løgtingið og landsstýrið er farið undir at tjóðartaka vinnufyritøkur og annars venda aftur til almennan rakstur av vinnufyritøkum.

Búskaparvøksturin í Føroyum fer at steðga upp komandi árini og tí er nógv, sum bendir á, at landsstýrið noyðist at heita á donsku stjørnuna, um at hækka ríkisstuðulin komandi 10 árini við umleið 300-500 mió.kr. árliga.

Vit kunnu tí hóskandi enda við einum slogan um niðurskurð í blokkstuðlinum sum: “Droym tað - royn tað ikki”.

Vit eru í nov. 2008, men tað fyriliggur enn ongin samlað uppgerð fyri vøru- og tænastujavnan 2007 og ongin uppgerð fyri kapitaljavnan ultimo 2007 (ogn og skuld).

Sostatt fyriliggur ongin uppgerð fyri gjaldsjavnan 2007 og heldur ikki higartil 2008. *Hvussu skulu vit vita, hvar vit skulu fara, tá vit ikki vita, hvar vit eru.* Hvussu kann Búskaparráðið o.o. veita álítandi og stýringarrelevanta ráðgeving við nærmast søguligum búskaparupplýsingum.

Keldur: Hagstova Føroya, Fællesudvalget for erhvervsudvikling i Grønland, okt. 2003